Føroyar-Finnland 31-30 (28-28(25-25(13-11))):

# Um-umdystur

**Finski favorittarnar vórðu tvingaðar í knæ av stórspælandi føroyska liðnum, sum spældi, stríddi og kempaði seg til ein fantastiskan sigur**

CHALLENGE-TROPHY
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Mezzocorona, Italia:** Einki er at ivast í, at hálvfinalan hjá føroyska hondbóltslandsliðnum móti Finnlandi verður ein av dystunum, sum hjá øllum leikarnum fer at vera í minninum í allar ævir.

Finnland vóru greiðir favorittar undan dystinum. Tað var nokk eingin, sum ivaðist í tí, men føroyska liðið hevði gjørt sítt fyrireikingararbeiði til lítar.

Fyrst høvdu øll verið í høllini, tá Finnland og Italia leiktu sínamillum dyst í bólkaspælinum, og hóast leikferðin her tóktist ræðandi, so tókitst uppgávan ikki heilt vónleys.

### Fantastiskur sigur

Og í øllum førum høvdu okkara gott mót, tá tær fóru undir hálvfinaluna. Tær megnaðu í stóran mun at fylgja finnlendingunum í leikferðini, og við einari fantastiskari Gunnleyg Berg inni á strikuni feingu vit ferð eftir ferð strítt okkum ígjøgnum verjuna, so talan antin gjørdist um mál ella brotskast.

Saman við Gunnleyg var Joan M. Djordjevic stóri føroyski leikarin fyrstu løtuna, men fyri hana fekk hetta ein bráðan enda, tá hon púra einsamøl traðkaði heilt skeivt á fótin, so hesin varð keiktur.

Men føroyska liðið treiskaðist. Tær vunnu seg framum undan steðginum, og hóast Finnland ta einu løtuna eftir steðgin skoraði fimm ferðir á rað, so svaraðu okkara aftur.

Fríða Petersen stóð ein kanón-dyst í málinum, eftir at hon loysti Helenu av, og í álopspartinum tóktust Simona og serliga Katrin av hava innstillað kanónina so klokkureint, at veit hvørja tí einastu ferð megnaðu at svara aftur, tá tað eydnaðist Finnlandi at skora.

Umdystur mátti til – Og eftir hetta enn ein umdystur, har einki var avgjørt, fyrr enn Finnland við 20 sekundum eftir misnýttu brotskast. Jú dramatikkurin var í hásætinum, og hóast føroysku kvinnurnar neyvan orkaðu at standa á beinunum, so mundu jubelscenurnar við vøllin nærum ongan enda taka. Føroyar í finaluni, og tað við manér.



*Ikki minst var tað framúr strikuspæl frá Gunnleyg Berg, sum var viðvirkandi til sigurin í hálvfinaluni*



*Og so kundi tann heilt stóri sigursdansurin framførast. Føroyar eru í finaluni*

### Hálvfinalan í tølum

**Føroyar Finnland 31-30**
Vanligur dystur 25-25 (13-11)
Fyrri umdystur 28-28 (25-26)
Seinni umdystur 31-30 (30-28)
Føroyskir málskjúttar: Katrin á Neystabø 8(2), Joan M. Djordjevic 5(4), Annika Ljósstein 5, Simona Hansen 4(1), Gunnleyg Berg 3, Gurið Mortensen 1, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1, Bára S. Klakstein 1
Føroysk brotskøst: Joan M. Djordjevic 4/4, Katrin á Neystabø 3/2, Simona Hansen 1/1, Gunnleyg Berg 1/0
Finsk brotskøst: 3/1
Føroyskar útvísingar: Gunnleyg Berg, Bára Skaale Klakstein
Finskar útvísingar: 4

## Tvær á stjørnuliðið



*Bæði Gunnleyg Berg og Simona Hansen fingu pláss á sokallaða All-Star liðnum, sum varð samansett eftir kappingina*

Sum siður er í slíkum kappingin, sum Challenge-Trophy er, so skuldi eisini eitt stjørnulið, eitt All-Star team, takast út.

Hetta varð gjørt á tann hátt, at venjararnir hjá ymsu londunum greiddu atkvøðu um, hvørjar leikarar teir hildu vera tær bestu í kappingini, og síðani varð eit lið sett saman út frá hesum.

Og her vísti tað seg so, at tvær av føroysku hondbóltskvinnunum vóru at finna á liðnum.

Ikki heilt óvæntað var Gunnleyg Berg onnur teirra. Við framúr strikuspæli var hon alla tíðina ein av lyklunum í føroyska spælinum, og hóast mótstøðuverjurnar royndu at byrgja fyri, so megnaðu tær ongantíð at steðga hesum partinum av føroyska spælinum.

Afturat sær á stjørnuliðið fekk Gunnleyg so Simonu Hansen, sum varð kosin besti høgri bakkur í kappingini. Ikki minst man tað vera skotstyrkin hjá Simonu, sum hevur imponera mótstøðuvenjararnar somikið nógv, at tey valdu hana til ársins leikara.

**-jm**

# Bíligir lærupengar

**Føroysku hondbóltskvinnurnar tóku sær kanska dekan ov nógv av løttum, tá tær taptu seinasta dystin í bólkaspælinum fyri Lettlandi**

CHALLENGE-TROPHY
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Mezzocorona, Italia:** Í seinasta dystinum í bólkaspælinum høvdu føroysku kvinnurnar einki at spæla um.

Sambært reglunum, so telja innanhýsis uppgerðirnar áðrenn málini, tá støðurnar skulu gerast upp, og tí vistu føroysku leikararnir av, at tær undir øllum umstøðum gjørdust vinnarar av okkara bólki. Ein staðfesting, sum skuldi vísa seg at vera enn tryggjari, tá Ísrael og Belgia leiktu javnleik í sínum dysti, soleiðis at tey bæi liðini bæði endaðu við trimum stigum mótvegis okkara fýra.



*Annika og Gunnleyg royna at stríðast, men tað gjørdu hvørki tær ella liðið í nóg stóran mun, og so vann Letland ein uppibornan sigur á føroysku kvinnunum*

### Avgreiðsla

Tað var eisini sjónligt, at hetta bert var ein dystur, sum skuldi avgreiðast.

Sjálvandi leggja leikararnir altíð í úrslitið av dysti, tá tær fara á vøllin, men tað var leingi greitt, at tær ikki løgdu eins nógv í tað hesaferð, sum tær høvdu gjørt tað dagin fyri.

Og frá venjarabeinkinum vórðu eisini nøkur taktist skift. Slitnu Helena Dam Poulsen og Katrin á Neystabø vóru spardar til seinnu uppgávur, og nógvar av leikarunum, sum undan hesum høvdu verið á beinkinum fyri tað mesta, fingu nú heilt fitt av spælitíð.

Tað líktist tó leingi einum føroyskum sigri, men tá okkara í seinna hálvleiki fóru at taka sær av løttum, vendist ikki aftur. Letland tóktist samstundis fáa alt betri mót upp á uppgávuna, og tá tær vunnu seinasta korterið við 8-2, var ikki stórt meira hjá okkara at gera.

### Bíligt tap

Talan varð tó ikki um tað stóru katastrofuna fyri okkara lið. Sjálvandi er eitt tap ongantíð nakað, sum strembað verður eftir, men dysturin hevði tó fleiri týðandi element við sær.

Ikki minst at fleiri av lyklaleikarunum fingu ein minni strævnan dag, enn tær annars høvdu, samstundis sum fleiri av óroyndu leikarunum fingu spælitíð.

Og so fekk føroyska liðið eisini at vita, at tað skal altso kempast og stríðast í hvørjum einasta dysti. Tað gjørdu tær bara ein hálvleik hesaferð, og tað var ikki nóg mikið.

### Dysturin í tølum

**Føroyar-Letland 24-27 (16-12):**
Føroyskir málskjúttar: Joan M. Djordjevic 4, Simona Hansen 4(2), Lív Sørensen 3, Annika Ljósstein 3, Gurið Mortensen 2, Anna Kr. Samson 2, Una Olsen 2, Heidi Maria Akselsen 1, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Anna Maria Samuelsen 1, Gunnleyg Berg 1
Føroysk brotskøst: Simona Hansen 3/2, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1/0, Annika Ljósstein 1/0
Letlendsk brotskøst: 11/5
Føroyskar útvísingar: Lív Sørensen 2, Gunnleyg Berg 2, Anna Maria Samuelsen 1, Simona Hansen 1, Annika Ljósstein 1
Letlendskar útvísingar: Eingin



# Einki var eftir



*Nikolina Eybjørnsdóttir var ein av føroysku spælarunum, sum seinastu dagarnar stríddist við skaðar, men sum kortini tók lut í dystunum*

**Tað mundi ikki vera nógv orka eftir í føroyska kvinnulandsliðnum at enda. Fimm dystir á fimm dagar høvdu síni sjónligu árin. Bæði í møði og í skaðum**

CHALLENGE-TROPHY
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mezzocorone, Italia: Tað er einki at siga til, um føroysku hondbóltskvinnurnar vóru nakað moyrar, tá tær tíðliga mánamorgunin fóru undir ferðina aftur til Føroya.

Fimm dystir upp á fimm dagar er ikki akkurát tað, sum leikararnir eru vanar við, og Malan Klakstein, sum var fysioterapetur á ferðini, mundi ofta kenna tað sum eina møtumikla uppgávu, tá hon royndi at fáa leikararnar klárar til dystirnar.

### Allir burdu hvílt seg

Ein av fleiri leikarum, sum soleiðis stríddi seg gjøgnum seinastu dystirnar við skaða, var Nikolina Eyðbjørnsdóttir úr VÍF.

Í dystinum móti Letlandi fríggajdagin, fekk hon skaða í síðuna, umframt at eitt blátt eyga eisini stóð á skránni, men hóast hetta, so var hon eisini við í hópinum teir báðar seinastu dystirnar. Eisini hóast hon mátti viðganga, at tað rættasta kanska vildi verið at lopið ein dyst um.

– Tað hevði nokk verið tað rættasta, um allar høvdu fingið møguleika at lopið dyst um onkran dagin, men tað ber bara ikki til. Og tá man nú er her niðri kortini, so vil man sjálvandi helst spæla.

Men fimm dystir upp á fimm dagar. Er tað ikki veruliga nakað, sum merkist í kroppinum, tá seinastu dystirnir eru á skránni?

– Sjálvandi. Serliga í gjár (leygardagin, blðm.) helt eg tað vera tungt at fara í holt við upphitingina, men í dag bilti ikki eins nógv. Men tað er klárt, at finalan gjørdist ein øgiliga tungur dystur fyri okkara viðkomandi. Vit høvdu jú 80 knallharðar minuttir móti Finnlandi, har Italia hevði eina væl léttari hálvfinalu, og tá tú so fer langt afturum í dystinum, so gerst tað eisini eyka tungt.

### Góvu tað seinasta

Men seinasta korterið ella so, tóktist tað kortini, sum mannaðu tit tykkum nakað upp. Var tað bara so, at tit tá skuldu geva tað allar seinasta?

– Ja, vit avtalaðu í seinasta time-out'inum, at nú skuldi tað bara kempast. Vit vóru eisini eitt sindur skelkaðar aftan á hatta við Anniku, og so at ein maður beint eftir tað small um í høllini. Tað gjørdi tað eitt sindur óhugnaligt eina løtu, men vit megnaðu so kortini at stríðast tað allar seinasta pettið.

Og sjálvt um talan so gjørdist um tap í finaluni, so helt Nikolina, at tær kunnu ikki annað enn vera nøgdar.

– Sjálvandi er tað ongantíð stuttligt at tapa, men Italia var nokk tað betri enn vit. Og vit høvdu jú ikki roknað við nøkrum sum helst, áðrenn vit komu her niður. Tí eru vit heilt sikkurt nøgdar við silvurmerkini, segði ein móð – men fegin – Nikolina Eyðbjørnsdóttir at enda.




